***§ 14. Ásetingar fyri øki G: Neystaøki.***

Stk.1. Økið verður lagt av til neystabygging

Stk.2 Byggistigi fyri neystagrundirnar kann ikki vera hægri enn 1,0.

Stk 3. Neystini kunnu byggjast við nýttum lofti. Við nýttum loftið skilst at byggjast kann uppihaldsrúm, køks-, vesi, og/ella baði-viðurskiftið. Neystini kunnu ikki nýtast til bústað ella leigubústað.

Stk 4. Treytin fyri at loyva neyst við nýttum loftið, er at eigarin av neystinum ber allar útreiðslur í samband við íbinding í kommunala leiðing, og niðara hædd verður varveitt sum neyst.

Stk.5. Neyst mugu ikki verða hægri enn 5,5m til mønuna, mált frá betonggólvi. Byggimynduleikin ásetur hæddina. Neyst skulu hava møn og skal hon vera í miðjuni og takhallið vera millum 15-42 gr.

Stk.6. Býráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig byggiætlan verður gjørd fyri alt ella stóran samanhangandi part av neystaøkinum og tá ætlanin er at varðveita verandi neyst.